Fleiri rásir - einki roks

Á Canal+ Film1 í kvøld kl. 20.00

# Ringanna harri: Kongurin kemur aftur



Ungi og djarvi hobbin Fróði við ringinum. Mann tað fara at eydnast honum at vinna á tí ónda valdinum?



Filmurin Ringanna Harri vann heili 11 oskarvirðislønir, m.a. fyri besta film og bestu leikstjórn

Við m.ø.: Elijah Wood, Sean Astin, Sir Ian McKellen, Cate Blanchett, Viggo Mortensen, Liv Tyler og Orlando Bloom.

Upprunaheiti — The Lord of the Rings: The Return of the King

Í hesum triðja og seinasta parti av Ringanna Harri verða allar undanfarnu frásøgurnar bundnar saman, og úrslitið er ein stórfingin filmur við fleiri ótrúligum løtum. Hin óndi Sauron og ræðuligi herur hansara fara undir at hertaka heimin. Og Fróði, djarvi hobbin, er tann einasti, ið kann bjarga Miðgarði. Saman við ferðaliði sínum fer hann til gongu ímóti Eldfjallinum. Ferðin er sera vandamikil. Gingið verður ígjøgnum myrkar skógir og upp um ivasom fjallaskørð, fíggindin er í hølunum á teimum og kann eisini verða fyri framman. Hesin síðsti parturin í røðini er fyri leikstjóranum, manninum aftan fyri filmsverkætlanina Peter Jackson, tann besti. Filmurin er hæddarpunktið í allari søguni, sigur hann. Høvundurin at Ringanna Harri, JRR Tolkien, hevur við verki sínum ávirkað fleiri ættarlið av lesarum. Og tað vóru fá, ið hildu at ein filmgerð av Ringanna Harri kundi verða væleydnað. Fyri Peter Jackson var alt arbeiðið ein stórur bardagi. Hann var herovastin, ið leiddi mikla herin av starvsfólkum — t.d. listafólk við serkunnleika innan talgildislist, vápnaserfrøðingar, steinmyndahøggarar, málfrøðingar, klædnafólk, stylistar, smiðir, modelbyggjarar, sjónleikarar og ikki minst heili 26.000 statistar. Øll hesi hava verið til at gjørt hugaheimin hjá Tolkien til veruleika á filmsspolanum.

# The Million Dollar Hotel

Á Kanal 5 sunnukvøldið kl. 21.00



Hin karismatiski Geronimo (Jimmy Smits) og Tom Tom (Jeremy Davies)



Dramafilmur frá 2000 við m.a. Milla Jovovich og Mel Gibson

Við: Tom Tom: Jeremy Davies. Eloise: Milla Jovovich. Agent Skinner: Mel Gibson. Geronimo: Jimmy Smits. Dixie: Peter Stormare. Vivien: Amanda Plummer. Jessica: Gloria Stuart. Shorty: Bud Cort. Izzy Goldkiss: Tim Roth. Terence Scopey: Julian Sands. Stanley Goldkiss: Harris Yulin. Leikstjórn: Wim Wenders

Navnið á hotellinum ljóðar fínt, men The Million Dollar Hotel í Los Angeles er eitt heim hjá nøkrum fátækum einstaklingum, ið ikki finna innivist úti í tí borgarliga samfelagnum. Hotellið fær enn verri orð á seg, tí tvey deyðsføll verða staðfest á staðnum. Filmurin byrjar við at hin ungi Tom Tom loypir í deyðan av ovastu hædd. Í lopinum hugsar Tom Tom um undanfarnu tíðina, um løgregluarbeiðið í sambandi við morðið á listamannin Izzy Goldkiss — ígjøgnum tankarnar hjá Tom Tom koma vit inná søguna í filminum. Tað kemur fram, at Izzy Goldkiss er sonur til ein kendan fjølmiðlamann, so nú verður FBI-agenturin Skinner (Mel Gibson) settur at kanna málið. Hann gerst skjótt greiður yvir, at gestirnir á hotellinum eru nakrir serskøltar og samfelagstaparar. Til dømis er Vivien ein av gestunum. Hon sigur, seg havi verið unnusta Izzys, men hesum ivast fleiri í. So er tað hin karismatiski Geronimo, sum í veruleikanum er ein verri lygnhálsur, ið roynir at vinna sær pening við at selja abstraktu málningarnar hjá Izzy. Skinner hittir eisini skøkjuna Eloise, ið dámar at lesa intellektuellan lesnað, og Dixie, ið roynir at sannføra øll fólk um at hann í veruleikanum er tann fimti limurin í The Beatles. Men sum kanningararbeiðið gongur gerst tað klárt, at eisini Skinner agentur hevur sínar heldur løgnu síður og serleikar.